Munnligur fyrispurningur

til Bjørn Kalsø, landsstýrismann

um Marknagilsdepilin og hølir til Fróðskaparsetur Føroya

1. Gongur byggingin av Marknagilsdeplinum sambært ætlaðu tíðar- og kostnaðarætlanini?
2. Gevur verandi býti av játtan til Marknagilsdepilin yvir ár møguleika fyri, at skúlin kann takast í nýtslu við skúlaársbyrjan 2016?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at framskunda part av játtanini, ið eftir ætlan skal latast í 2016, um hetta er neyðugt fyri at taka skúlan í nýtslu á sumri 2016?
4. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin, at fáa til vega høli til Fróðskaparsetur Føroya, soleiðis at tað m.a. ber til at savna virksemið og skapa eitt gott lestrarumhvørvi?
5. Nær tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum um møguligt keyp av Venjingarskúlanum (tey 50% sum kommunan eigur í dag) til Fróðskaparsetur Føroya?

Viðmerking
Føroya stórsta skúlabygging er í løtuni í gongd – úti í Marknagili. Hetta er ein stórfingin verkætlan, ið øll kunnu fegnast um, nú er gongd á, og fer at røkka sínum máli um heilt fá ár.

Sambært tíðarætlanini skal skúlin takast í nýtslu við skúlaársbyrjan 2016. Men tíverri er játtanin til verkætlanina spjeidd soleiðis yvir árini, at sera stórur partur fellur júst tað seinast árið – ár 2016. Tað, ið eftir er av játtanini, verður býtt soleiðis: 85 mió. kr. í 2014, 95 mió. kr. í 2015 og 168,5 mió. kr. í 2016.

Hetta kann ávirka møguleikan at hava bygningin kláran við skúlaársbyrjan í 2016. Neyðugt kann tí vera at framskunda játtanina, men um so er, má landsstýrismaðurin upplýsa Løgtinginum.

Fróðskaparsetur Føroya húsast í dag í nógvum ymiskum hølum. Hetta ger tað m.a. trupult at skapa neyðuga lestrarumhvørvið og samanspælið millum ymisku útbúgvingarnar. Tíðin er komin til, at fáa til vega neyðug høli til Fróðskaparsetur Føroya. Hetta leggur frágreiðing um fólkvøkstur eisini upp til, og víst verður har á møguleikan at keypa Venjingarskúlan, og dagføra henda.

Samstundis hevur Mentamálaráðið fingið møguleikan at keypa Venjingarskúlan – ta helvt, ið Tórshavnar kommuna eigur (landið eigur hina helvtina). Enn hevur tó onki verið at frætta um avgerð í hesum máli.

Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 28. januar 2014

Kristina Háfoss
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi